# Skráin fyri SøluRásina 2003

**Leygardagin 8. november**

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00 | Sølurásin 2003 letur upp |
| Kl. 15.30 | Torbjørn Jacobsen løgtingsmaður setur stevnuna |
| Kl. 16.00 | Magni Christiansen syngur |
| Kl. 18.00 | Mótaframsýning |
| Kl. 19.00 | Glott og Gleimur við Ásbjørn og Absalon |
| Kl. 20.00 | Mótaframsýning |
| Kl. 21.00 | Jónsvein og Birgir syngja á pallinum |
| Kl. 21.30 | Drigið verður millum tey seldu atgongumerkini |

**Sunnudagin 9. november**

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00 | Sølurásin 2003 letur upp |
| Kl. 16.00 | Angela og Hannibal undirhalda |
| Kl. 17.00 | Mótaframsýning |
| Kl. 17.30 | Vørutombola í bygdasalinum |
| Kl. 19.00 | Børn úr Nósa Barna Prix syngja. Fløgan verður signerað |
| Kl. 20.00 | Mótaframsýning |
| Kl. 21.00 | Jens Marni Hansen og Ólavur Øster syngja á pallinum |
| Kl. 21.30 | Drigið verður millum tey seldu atgongumerkini, og høvuðsvinningurin verður drigin. |
| Kl. 21.45 | SøluRásin 2003 letur aftur |

## BÁSAYVIRLIT

| | | |
|---|---|---|
| 01. | Diana Borgnýardóttir | (Design ullavørur) |
| 02. | NYZAC | (Teldur, spøl og fototól) |
| 03. | Preeti Payal | (Klæðir, gávulutir) |
| 04. | Leikabúðin | (Leikur) |
| 05. | KA-KI og Vello | (Galla klæðir og magnet) |
| 06. | Hjá Sannu | (Klæðir) |
| 07. | Sirri | (Ullavørur) |
| 08. | VW | (Bilar) |
| 09. | KBI | (Amboð og olja) |
| 10. | Tubbaksverndarfelagið | |
| 11. | Føroya Tele | (Telefonir og Televarp) |
| 12. | Harryson Smykkur | (Smykkur) |
| 13. | Diana Jacobsen | (Meturvørur) |
| 14. | Jallur | (Klæðir) |
| 15. | Sølurásin | (Bamsutombola) |
| 16. | Eikin | (Innbúgv) |
| 17. | Hansen | (Viðfestisvognar) |
| 18. | Shari | (Klæðir) |
| 19. | Hjá Anfinni | (Gávulutir) |
| 20. | Josi | (Klæðir) |
| 21. | Glarlist | (Glastilevning) |
| 22. | C-IT | (Filmar) |
| 23. | Tektrade | (Bátaútgerð) |
| 24. | Snældan | (Ullavørur) |
| 25. | Skóbúðin | (Skógvar) |
| 26. | Shop Inn | (Klæðir) |






# Kvæðarockur til Russlands

**Føroyski rockbólkurin Týr fer nú á konsertferð við tónleikinum av nýggjastu fløguni Eric The Red. Teir spæla í Føroyum, Russlandi og seinni í Íslandi og Týsklandi. Teir hava aftur broytt manningina í bólkinum**

TÝR
*Eyðun Klakstein*

Fyrr í ár kom bólkurin Týr við sínari nýggju fløgu, Eric the Red, og nú fara kvæðarockararnir á konsertferð við hesum tónleiki.

Lagt verður fyri í føroyum síðst í november mánaði, tá ið Týr fer at spæla til trý tiltøk eitt vikuskiftið. Hóskvøldið 27. november spæla teir á Margarinfabrikkini í Havn, fríggjakvøldið í Klubbanum í Klaksvík og leygarkvøldið í VB-húsinum í Vági.

Fyrst í desember gongur leiðin til Russlands, hagar Týr er boðið at spæla.

Týr skal spæla á væl umtókta Red Club í St. Pætursborg, og á Santa Lucia stevnuni, ið er eitt norrønt tiltak, í Petrozavodsk. Hesar konsertir skulu vera við til at marknaðarføra Týr, nú felagið CD-Maximum gevur fyrstu fløguna hjá Týr, How far to Asgaard, út í øllum fyrrverandi Sovjetsamveldinum.



*Nógvir ummælarar meta, at Týr standa á gáttini til altjóða gjøgnumbrot í metal-heiminum*

### Eisini til Íslands

Týr hevði fyri tveimum árum síðani eitt ordans hitt í Íslandi við Orminum Langa, og íslendingar hava ikki gloymt føroyska bólkin. Tí ætlar Týr sær eisini til Íslands at spæla.

Hendan konsertferðin verður saman við svenska bólkinum Freak Kitchen.

Týr fegnast um møguleikan at spæla aftur í Íslandi, og enn er hetta størsti marknaðurin hjá Týr.

Konsertferðinar hjá Týr hava fingið dyggan stuðul frá Mentanagrunni Landsins, Atlantic Airways, Skipafelagi Føroyar, Norðurlandahúsinum, Mentamálaráðnum og Fitur.

– Hesin góði stuðulin er avgerðandi fyri framgongdina hjá bólkinum, og vit fegnast um, at føroyskir og íslendskir stovnar og feløg vilja stuðla útflutningi av føroyskum tónleiki, siga teir í Týr.

### Nógv ummæli

Útgávan Eric The Red verður enn ummæld um allan heim, og serliga gongur væl í Týsklandi og Finlandi.

Finska Inferno Magazine gevur Eric The Red 8/10 og fer at skriva um Týr í einari serligari víkinga útgávu av blaðnum í desember, LetsMakeSomeNoise gevur Týr 4/5, Desibel.net gevur fløguni 4/5, og Imperiumi gevur 8,5/10.

Í Týsklandi eru eisini nógv góð orð at fegnast um, og Metal Observer Magazie skrivar, at tónleikurin hjá Týr er bergtakandi og íoyrafallandi. Ummælarin sigur, at hann ongantíð áður hevur hoyrt slíka blanding av víkingamáli, fólkatónleiki og rocki áður.

Onnur týsk tíðarrit rósa eisini fløguni hjá Týr, sum eisini verður ummæld og spæld í Italia, USA, Portugal, Noregi og Australia.

### Sóknast eftir nýggjum manni

Tað er aftur nú broyting í manningini í Týr. Gittarspælari Terje Skibenæs er farin burtur úr, og tí sóknast Týr nú eftir nýggjum gittarspælara.

Heri, Kári og Gunnar spældu tríggir í Keypmannahavn hin 30. august, og tað gekk stak væl. Teir hava tí gjørt av at halda fram sum ein trio til nýggjur gittarleikari er funnin.

Týr sigur í tíðindaskrivi, at áhugaðir gittarspælarar kunnu seta seg í samband við bólkin. Tað er ein fyrimunur at spæla á 7-strongdan gittar og at duga at syngja.

Týr hevur fleiri spennandi uppgávur fyri framman, tí teir eru longu bidnir til tveir týskar festivalir komandi summar, Headbangers Open Air og Rock-Town.

Nógvir ummælarar meta, at Týr standa á gáttini til altjóða gjøgnumbrot í metal-heiminum.

# Vikan varðar nú ein mánað

**Tað, sum plagdi at verða ein missiónsvika, varðar nú ein mánað. Fríggjakvøldið verður hol sett á missiónsmánaðin hjá KFUM & K í Klaksvík. Møti, bíbliutímar, hugni, tónleikur, sangur, áhugatímar og annað stendur á skránni restina av mánaðinum**



*Í novmber hevur KFUM & K í Klaksvík missiónsmánað við ymiskum tiltøkum, sum eisini fara út til smærri bygdirnir í Norðoyggjum*

MISSIÓNSMÁNAÐUR
*Eyðun Klakstein*

Í fjør royndi KFUM & K fyri fyrstu ferð at víðka tað, sum tey vanliga róptu missiónsvikuna, til at varða ein heilan mánað, og hetta spældi so væl av, at tey endurtaka mánaðin – og ikki vikuna – aftur í ár.

Síðsta sunnudag var fyrsta tiltakið í hesum missiónsmánaðinum, men fríggjakvøldið verður av álvara sett hol á skránna.

– Vit, sum eru trúgvandi í KFUM & K, vilja bjóða øllum at verða við. Vit fara út til nógvar bygdir í Norðoyggjum, og vit fara at boða gleðiboðskapin um Jesus, sigur Pól Johannessen, sum er skrivari og trúboðari hjá KFUM & K í Klaksvík.

Ein orsøk til, at vikan nú verður mánaði, er, at við hesum fáa eitt nú útróðrarmenn møguleikan at koma til onkur av tiltøkunum, og nú øll tiltøkini verða hildin kring vikuskiftið og ikki gjøgnum vikuna, ber betur til at fáa talarar og sangarar at verða við.

### O.K. um andan í glasinum

Undirheitið fyri missiónsmánaðin er »Fylg mær«, og tað eru sera ymisk tiltøk á skránni.

Lagt verður fyri fríggjakvøldið við einum møti, har Regin Høgnesen fer at tala, og har Magni Christiansen fer at syngja. Leygarkvøldið verður konsert við kórsangi í Christianskirkjuni, og sunnudagin eru aftur møti og sangur á skránni í KFUM & K.

Umframt møti og sang eru eisini nakrar áhugatímar á skránni, og her verður tosað um ymiskt, sum er frammi í tíðini.

Leygarkvøldið fer Jørmund Foldbo at tosa um at byggja brýr, og seinni í mánaðinum fer Peter O. K. Olofsson at tosa um andan í glasinum.

22. november verður tosað um missión, og tá verður Gimmi Olsen við live úr Afrika.

Til øll tiltøkini verður barnaansing, kaffi verður aftaná møtini, og møguleiki verður at keypa bøkur, fløgur og annað.

### Eykanummar við kóri

Eitt av tiltøkunum hetta vikuskiftið er konsert í Christianskirkjuni. Har fer kórið, sum var til sangskeiðið hjá Heimamissiónini herfyri, at syngja.

Sangskeiðið endar altíð við konsert, men hesaferð verður eitt eykanummar við kórinum. Kórið, sum taldi 135 fólk, fer at venja og syngja í Klaksvík leygardagin, og harafturat fer barnakórið av sangskeiðnum eisini at verða við á konsertini. Tey hava styrkt seg við nógvum klaksvíksbørnum til hesa konsertina. Konsertin í Christianskirkjuni verður leygarkvøldið kl. 19.30.